planet.fo
Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

## The Dreams fyrstu ferð við Múrin

Nógv eru tey ið hava forvitnast eftir, nær teir vælumtóktu dreingirnir í bólkinum The Dreams aftur skula framføra í Føroyum. Í samrøðu við Planet sigur Hans Edward, at fyrstu ferð teir trína á føroyskan pall í 2009 verður á Festivalinum við Múrin. Ikki er tað ókent at The Dreams skulu framføra við Múrin, men tos hevur verið um at The Dreams møguliga leitað sær til Føroya at framføra áðrenn hetta. Hesum avsannar Hans Edward, sum samstundis sigur seg síggja fram til at enn einaferð spæla fyri okkum føroyingum.

## Kulur DJ'ari í Rex

Leygarkvøldið var eitt sera væl eydna DJ show í Rex við Martin Kjærbo. Planet var á staðnum.

Fáir DJ'arir kunnu sigast at spæla tónleik ið nærum øll kunnu fáa ágóðan av, men soleiðis var ikki leygarkvøldið. DJ Martin Kjærbo megnaði til fulnar at halda huglagnum hjá teimum vitjandi uppi , og sjáldan var ein keðilig løta. Tónleikurin var fjølbroyttur, tó vóru tey spældi løgini í flestum førum løg, ið fólk flest kennast við. Hóast løgini í so máta ikki vóru av tí nýggjasta slagnum, so vóru løgini so mikið fjølbroytt umframt vælkend, at tey ikki gjørdist óáhugaverd. Alt í alt eitt sera væl eydna kvøld, og DJ Martin er eftir øllum at døma ein DJ'ari, ið megnar at undirhalda einum sera fjølbroyttum skara av fólkið.

# "Street Team" hjálpir ungdóminum



**Margarinfabrikkin er fari undir eitt nýtt átak undir heitinum "Street Team". Endamálið er at virka fyribyrgjandi og at geva ungdóminum nýggjar møguleikar.**

Margarinfabrikkin hevur seinastu árini verið karmur um nógv ungdómstiltøk, og nú hava fólkini handan Margarinfabrikkina víðka um virksemi sítt. Sambært stigtakarunum hevur tørvur verið á einum savningarstaði í vikuskiftunum hjá ungum ímillum 12 og 16 ár. Hesi ungu hava einki at takast við um í vikuskiftunum, og tískil hevur Margarinfabrikkin nú nýggj tilboð at bjóða teimum.

### Fara út til ungdómin

Høvuðstátturin í nýggja átakinum er, at tvey umboð frá Margarinfabrikkini ganga runt í miðbýnum í Havn og finna fram til hvar ungdómurin heldur til. Síðani verða tey ungu boðin í Margarinfabrikkina, har ymiskt undirhald er á skránni. Soleiðis virkar "Street Team" fyri at taka tey ungu av gøtunum, og geva teimum okkurt at takast við í vikuskiftunum. Sum dømi kann nevnast at ymsar tónleika framførslur hava verið í hesum sambandið, og tey ungu hava sambært stigtakarunum tikið væl ímóti hesum.

- Talið av ungum vitjandi er tvífalda, síðan vit byrjaðu at hava opið um vikuskifti, sigur Bogi Andreasen við Sosialin.

### Starvsfólkini virka sum ráðgevar

Bogi Andreasen og Salua Manai, stigtakararnar handan "Street Team" siga, at teirra leiklutur er sera ymiskur frá persóni til persón. Nógv av teimum ungu ið leita sær oman í Margarinfabrikkina um vikuskiftini, hava stóran tørv á at hava onkran at tosað við. Spurningar verða settur um kynslív og kærleika, umframt at tey ynskja ráð um mangt og hvat. Bogi Andreasen sigur, at tey ungu eru sera opin fyri starvsfólkunum, og at tey eftir øllum at døma taka ráðini frá starvsfólkunum til eftirtektar.

### Vilja hava størri ábyrgd

"Street Team" og Margarinfabrikkin hoyra undir barna- og ungdómsdeildina hjá Tórshavnar Kommunu, og fáa tey játta stuðul til millum annað átakið "Street Team". Stigtakararnar hava ætlanir um at víðka um átakið, og framtíðarætlanirnar eru stórar.

- Vit vilja spesialisera okkum innan ein ávísan aldursbólk, sigur Bogi Andreassen.

Um "Street Team" kann fáa ábyrgdina frá Tórshavnar Kommunu at varða av aldursbólkinum 12-16 ár, kann virksemi víðkast, soleiðis at hesin aldursbólkur kann fáa tað neyðugu umsorganina.

- Vit kunnu fara út í skúlarnar og ferðast runt alla Tórshavnar Kommunu, soleiðis at vit kunnu røkka út til so nógv í hesum aldursbólki sum møguligt, sigur Bogi Andreassen.

Saman við SSP samskipanini vil "Street Team" virka fyribyrgjandi, og fanga trupulleikarnar áðrenn teir gerast ov stórir.

- Vit hava ikki fatan av at ungdómurin er á skeivari kós tá talan er um rúsevnir, men vit vilja saman við SSP samskipanini virka fyribyrgjandi, so hetta ikki kann gerast ein trupulleiki seinni, sigur Bogi Andreassen í samrøðu við Sosialin.